# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Tórshavnar Skipasmiðja:

## Magnus Magnussen nýggjur stjóri



Tórshavnar Skipasmiðja hevur sett Magnus Magnussen úr Kvívík sum nýggjan stjóra.

Tá Íløgufelagið Notio fyrr í summar keypti skipasmiðjuvirksemið hjá Tórshavnar Skipasmiðju varð kunngjørt, at ætlanin var at seta ein stjóra afturat Gunnari Mohr. Leitað hevur síðan verið eftir hesum stjóra, og Skipasmiðjan fegnast um, at avtala nú er gjørd við Magnus Magnussen um starvið.

Magnus er 44 ára gamal og hevur seinastu árini starvast sum tekniskur leiðari hjá Strandfaraskipum Landsins – hetta seinasta árið tó sum projektleiðari av byggingini av nýggja Smyrli í Spaniu. Hann lærdi til maskinsmið á Tórshavnar Skipasmiðju árini 1978 til 1982. Eftir lokna lærutíð las hann til maskinmeistara og tók prógv á Maskinmeistaraskúlanum í Tórshavn í 1986. Eftir at hava siglt nøkur ár fór Magnus í 1988 undir at lesa til maskinverkfrøðing í Århus, har hann tók prógv í 1992.

Árini 1993 til 1997 starvaðist hann hjá stóra danska motorframleiðaranum MAN B&W. Í hesum starvi arbeiddi hann eisini longri tíðarskeið í Suður-Korea á risastóru Hyundai Skipasmiðjuni har.

Hóast Magnus Magnussen nú er settur stjóri á Skipasmiðjuni, eru Skipasmiðjan og Strandfaraskip Landsins samd um at finna ein felags leist, soleiðis at eftirlitið við byggingini av nýggja Smyrli ikki verður darvað av hesum.

## Tøkk

Vit takka hjartaliga øllum tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til og vístu samkenslu, tá ið okkara kæri sonur, bróðir, mannubeiggi og svágur

**Tummas Poulsen**
**Argir**

so brádliga andaðist á Eirargarði og varð jarðaður.

Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til »Zarepta«.
Tøkk til starvsfólkini á stovnunum í Garðsgøtu,
í Smærugøtu og á Eirargarði, sum hava tikið
sær so væl av honum tey seinastu gott trý árini.

Tøkk til talarar í Kapellinum, í Hebron og á grøvini,
og tøkk til Jústinus Eidesgaard og Emmu fyri teirra
vøkru minningarorð í Sosialinum og Dimmalætting.

**Mariel, Páll, Maria, Ásla og Bjørg**

## Nessie og Sofus Poulsen gullbrúdleyp



Fríggjadagin 10. september kunnu hjúnini Nessie og Sofus Poulsen, 10, Rosewell Pl, í Aberdeen halda gullbrúdleyp.

Tey hittust í Skotlandi, hagar Sofus var fluttur saman við sínari familju í 1946.

Í 1948 fekk Sofus skrivstovustarv á føroysku umboðsstovuni, og tá Odmar Skarðhamar í 1978 vegna aldur fór úr starvinum sum føroyskur umboðsmaður, varð Sofus settur í hetta starvið, sum hann røkti inntil fyri fáum árum síðani, tá hann eisini fór frá vegna aldur. Tá varð eisini føroyska sendistovan í Aberdeen niðurløgd, og einki føroyskt flagg er longur at síggja uttan fyri bygningin á 150 Market Street í Aberdeen.

Sofus og Nessie giftust í 1954. Tey fingu 4 synir - Daniel, Charles, Roy og John. Teir hava allir familju og búgva eisini í Skotlandi.

Vit ynskja teimum hjartaliga tillukku á hátíðardegnum

Listaframsýningin:

## Tað er einki at flenna at...



2. september 2004 læt upp listaframsýningin, Tað er einki at flenna at, uttan teimum báðum har yviri. Tað eru tey trý, Tummas Jákup Thomsen, Malan Tyril og »Gulli« ið sýna fram. Tummas J. við tekningum og instalatiónslist. Malan við yrkingum og 2. tekningum og »Gulli« við tónleiki.

*Hvat er tað sum tey vilja við hesum?*
»Gulli« vil eftir ár við myrkum døprum tónleiki, har fjørutrøll og huldufólk myndaðu tónleikin, vísa tað ljósu og glaðu síðuna fram av lívinum. »Gulli« er farin frá málmi og malargróti yvir til bleytan, melidiøsan teldutónleik við íblástri úr gamlari føroyskari søgu, og er hettar tað ið »Gulli« sýnir fram á framsýningini.

*Hvat Malan vil? Hvat vil hon?*
»Eg vil sum so einki«, sigur hon, og hyggur uppeftir. »Men jú, eg vil nógv. Eg havi nógv at siga, og tað skrivi eg niður. Eg skrivi tankar niður, tá eg eri í døpurhuga ella tá eg eri glað. Ella tá eg undrist yvir lívið sum er mær bæði vakurt og ljótt. Tann føroyska náttúran er mær ein íblástur til at lýsa mína undran, sorgir og gleðir, fyri tíðina eisini vakurleikan«.

***Áin***
*Áin tutlar uttan fyri,*
*tað hevur verið friðarligt*
*eina tíð.*

***Kavin bráðnar***
*Eg vassi á vegnum,*
*men sólin hitar meg.*
*Eg helt áin teskaði mær*
*nökur orð í oyrað,*
*men tað vóru einglarnir*
*sum vaskaðu sær í tí nýggja*
*reina vatninum.*

*Vakur og syngjandi sat ein*
*fuglur á bönum.*
*Haldi hann sang um kavan*
*ið bráðnaði.*
***Malan Tyril***

Tummas: »Tað sum eg vil, tá ið eg tekni er at lýsa eitt innara landslag ið eg annars ikki hevði kunna greitt frá, uttan at kunna tekna tað niður. Eisini haldi eg at tekningin fær ov lítla virðing. Sjálvur haldi eg, at tað er tí at tað eru eingir litir á tekningini, og tí sýnist hon køld og nakin. Mær hevur altíð dámt væl at tekna, og tað eru nakrar av hesum tekningum eg sýni fram. Tær eru frá ´97 - ´99. Nakrar eru, sum ikki hava verið sýndar fram áður. Eisini havi eg instalatinónslist við á hesi framsýning. Eg haldi at tað er alt ov sjáldan at slíkt er at síggja í Føroyum. Annars eri eg rættuliga nógv eksperimenterandi í løtuni, men havi tó ikki blaka tekningina til viks. Hon fer altíð at verða hornasteinur mín«.

Listaframsýningin, tað er einki at flenna at, uttan teimum báðum har yviri, verður opin til og við sunnukvøldið. Opið er frá 15-00 til 22.00. Tó verður ein »Happyning« aftrat, sum verður leygarkvøldið kl. 21.00, har »Gulli« enn einaferð verður málaður, og møguligani verður okkurt annað á skránni, so sum tónleikur.

Framsýningin er í hølum Arbeiðsmannafelagsins (Ground Floor) í Fuglafirði.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Føroya Banki, N. Finsensgøta:

## Kundaráðgevingin fær fyrsta prioritet

**Fríggjadagin 3. september var móttøka í Føroya Banka í Niels Finsensgøtu í Havn, í samband við at deildin læt upp eftir eina umfatandi umbygging. Umleið 400 fólk vóru til móttøkuna, har eisini livandi tónleikur var framførdur**

*Myndir: Jens Kristian Vang*

Deildin hjá Føroya Banka í Niels Finsensgøtu læt fríggjadagin upp sum fyrsta deild bankans í heilt nýggjum sniði.

Jørn Astrup Hansen bankastjóri helt eina røðu, har hann segði frá nýggja konseptinum, sum vit eisini fara at síggja í øðrum deildum bankans.

Á skránni var eisini undirhald við livandi tónleiki frá Lenu & Niclasi, Martin Joensen Band og tónleikarum úr bólkinum Páll Finnur Páll.

Nýggju hølini eru opin og kundavinarlig, og bankin kann nú bjóða kundum sínum ráðgeving í innbjóðandi hølum.

Hølini eru ikki longur býtt upp í kunda- og starvsfólkaøki, nú eru tey felags fyri bæði kundar og starvsfólk.

Innbúgvið er, í samstarvi við Sp/f MAP Arkitektar í Havn, designað til Føroya Banka.

Móttøka av kundum er við kundadiskin, sum ávísir ráðgevar, flytingar og avgreiðslur. Ein nummarskipanin er, har kundin kann taka eitt nummar til ávikavist inn- og útgjøld ella móttøkuna.

Kundar verða síðan vístir til ráðgevan, um hesin er tøkur. Við móttøkuna fáa kundarnir eisini upplýsingar um tænastur bankans, um tað er okkurt, sum teir ivast í.



*Nú eru hølini í bankanum felags fyri bæði kundar og starvsfólk*



*Nýggju hølini eru opin og kundavinarlig*



*Børnunum dámdu væl nýggju stólarnar*



*Eyðun Mørkøre og Øssur S. Nolsøe frá føroya Sparikassa fáa eitt prát við Niels Joensen í Føroya Banka*




*Vælkomin í ein nýggjan Føroya Banka, stendur á skeltinum. Her verður Jan Christiansen, borgarstjóri, boðin vælkomin*



*Andras Róin, stjóri á Føroya Tele, og Janus Petersen, stjóri í Føroya Banka*



*Jørn Astrup Hansen bankastjóri helt eina røðu, har hann m.a. segði frá nýggja konseptinum*



*Í einum telti uttan fyri spældu tónleikarar úr bólkinum Páll Finnur Páll*

### Dagurin

**10. september. Burchhardt,** deyður umleið ár 754. Munkur úr Wessex í Onglandi. Hann fór seinni sum trúboðari til Galliu og endaði sum biskupur í Würtzburg í Týsklandi.